Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
28. januar 2019

Okkara j.nr.
19/00013-2

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.

**Viðv.: uppskoti til kunngerð um skipan av serflokkum í fólkaskúlanum**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotið til kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð (skipa serflokkar).

Í fyrsta lagi skal viðmerkjast, at tá hugt verður eftir innihaldinum í hesum uppskoti til kunngerð, sæð í mun til innihaldið í kunngerð nr. 127 frá 2018, sum báðar vísa til § 45 stk. 7 í fólkaskúlalógini, kann verða spurt, hví neyðugt er at hava tvær ymsar kunngerðir. Í ávísum viðurskiftum sýnist sum um talan er um reguleringar, ið dekka sama øki. Mælt verður tí til at umhugsa at samanskriva hesar báðar kunngerðirnar.

Harnæst skal viðmerkjast, at í sambandi við at fólkaskúlalógin varð broytt á vári 2018, har heimild varð veitt fyri m.a. hesi kunngerðini, hevði Kommunufelagið á hoyringsfundi í Mentamálaráðnum og í hoyringarskrivinum, ið varð sent øllum løgtingslimum viðmerkingar um, at Kommunufelagið kundi hugsað sær at tað bleiv arbeitt við at tað bleiv útgreinað, hvussu økið sær út í dag, sæð í mun til hvat broytingarnar í lógini koma at merkja. (Hesar viðmerkingar vóru rættaðar til Førleikastovurnar, men eru í stóran mun eisini galdandi fyri serflokka-/serskúlaskipanina.) Hetta tí, at kommunurnar nýta hópin av peningi bæði til rakstur og íløgur í karmarnar kring fólkaskúlan og tað er tí sjálvsagt at tær hava áhuga í at vera við til at leggja til rættis, hvussu karmarnir verða nýttir best møguligt.

Tað sæst ikki, at hædd er tikin fyri hesum sjónarmiðum í viðmerkingunum til lógarbroytingina (løgtingsmál nr. 107/2017).

Nú tá uppskotið til kunngerð um at skipa serflokkar (skipa serskúlar), við heimild í nevndu lógarbroytingum, er komið til hoyringar, sæst framvegis ikki, hvørt Mentamálaráðið hevur fyrihildið seg til hesi faktuellu viðurskiftini, m.a., hvussu nógvir næmingar eru, ið kunnu hugsast at fáa tilboð um serflokk ella serskúla, hvussu hesi eru spjadd landafrøðiliga og hvussu rákið er innan hetta økið.

Í upprunaliga uppskotinum til broyting í lógini varð sagt, at uppskotið ikki hevði fíggjarligar avleiðingar fyri kommunalar myndugleikar. Kommunufelagið viðmerkti tá, at henda upplýsing ikki var nøktandi, tí kommunurnar hava skyldu at skipa karmarnar fyri, at hesi tilboð og ásetingar kunnu setast í verk, soleiðis at tá eitt tilboð varð skipað, so viðførdi hetta helst

útreiðslur fyri kommunurnar. Kommunufelagið kann tí als ikki góðtaka, at Mentamálaráðið í viðmerkingunum til lógaruppskotið als ikki hevur fyrihildið seg til, hvørt uppskotið fær fíggjarligar avleiðing fyri kommunurnar. Nú sæst t.d. í § 8 í uppskotinum til kunngerð, at *“Serflokkur hevur egin høli, sum skulu vera egnað til endamálið.”*, og nú gongur sjón fyri søgn, at hetta fær beinleiðis fíggjarliga ávirkan á kommunala geiran. Tískil er yvirskipaða viðmerking okkara um at fáa eitt yvirlit yvir tørv, gongd og ætlan á økinum enn meira viðkomandi, soleiðis at kommunali geirin eisini fær fyrihildið seg til hesi viðurskifti.

Samanumtikið eigur skúlamyndugleikin á staðnum, t.e. kommunustýrið og skúlastýrið, sambært allýsingini í § 46 og 50 stk. 1 í lógini, at vera nógv meira sjónligum sum myndugleiki í kunngerðini um at skipa serflokkar.

Til einstøku ásetingarnar er at viðmerkja fylgjandi:

Til § 1 stk. 4:
Skúlaleiðarar hava víst á, at tørvur er á einum tilboði aftrat, sum tí í Skúlanum á Fløtum í Tórshavn, sum skal vera fyri børn frá forskúla til og við 3. flokki.

Í § 1 stk. 4. stendur, at serflokkur er vanliga fyri næmingar frá 4. flokki til og við 10. flokk.

Mælt verður til, at hetta verður broytt til: Serflokkur er fyri næmingar frá forskúla til og við 10.flokk, og at í kunngerðini ella dagstovnalógini at tillaga frítíðartilboðið samsvarandi.

Til § 6 stk. 1:
Kommunufelagið metir, at tað er sera umráðandi at fáa strikað orðið “starvsfólk” í ásetingini. Ein og hvør starvssetan skal viðgerast í trúnaði, og at latið starvsfólkini verið við í setanartilgondini hevði verið brot á allar vanligar fyrisitingarligar mannagongdir. Setan av starvsfólki er sjálvsagt ein leiðsluspurningur burturav.

Til § 6 stk. 2:
Tað er umráðandi at toymisleiðarin er útbúgvin lærari, tí hann kennir væl skúlaskipanina, og hevur tí best skil fyri, hvussu ein næmingur kann slúsast inn ella inn aftur í vanliga flokkin og hava tilknýti til hann.

Í § 6 stk. 2 stendur, at toymisleiðarin er fólkaskúlalærari við eftirútbúgving innan serøkið ella hevur aðra samsvarandi námsfrøðiliga útbúgving við eftirútbúgving innan serøkið.

Mælt verður til, at hetta verður broytt til: Toymisleiðarin er fólkaskúlalærari við eftirútbúgving innan serøkið.

Til § 7 stk. 2:
Starvsfólkini í sertilboðum eru partur av starvsfólkabólkinum í tí skúla, sertilboðið er staðsett, tí eiga tey at hava somu rættindi og skyldur, sum hini starvsfólkini.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Kommunufelagið

Í § 7. stk. 2 stendur, at starvsfólkini í serflokki luttaka á námsfrøðiligum fundum og øðrum felags tiltøkum í skúlanum eftir avgerð skúlaleiðarans og í samráð við toymisleiðaran.

Mælt verður til at hetta verður broytt til: Starvsfólkini í serflokki luttaka á námsfrøðiligum fundum og øðrum felags tiltøkum í skúlanum.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**